# Minningarorð um Jóhannes Holm Jacobsen, Hvalba
## f. 1924 - d. 2010

Tá ið eg seti meg niður at skriva nøkur orð um mín góða vin og bróðir í Harranum, sum nú er komin heim í teir ævigu bústaðir hjá Gudi, leita tankarnir aftur til farnar dagar. Vit komu at kennast vesturi á Zarepta fyri meira enn 30 árum síðan. Vit vóru leiðarar á barnalegunum hjá dreingjaholdunum fyrstu árini vit vóru saman. Síðan vóru yngri kreftir, sum tóku yvir og vit fóru í annað arbeiði.

Hannis var tann, sum bleiv náttarvakt og gjørdi hann tað til lítar. Tað var eint og ruddiligt hjá okkum at koma upp um morgunin, uppvaksið var væl úr hondum greitt og borðið dekkað.

Tað arbeiði, eg fekk, var at vera køksmaður fyri tað mesta í grovkøkinum, vaska grýtur, kóka epli og hjálpa køkskonunum við døgurðanum og ymiskt annað, sum har til hoyrdi.

Hannis og eg vóru saman á hvørjum sumri hesi árini. Tað var ein andaliga góð tíð fyri okkum at vera saman á Zarepta. Man kom at kenna nógv fólk og samfelagið var gott. Um kvøldarnar, tá ið mesta rokið var av, kundu vit seta okkum at syngja saman við øllum køksfólkunum. Hanni svar góður forsangari, hann dugdi tey flestu løgini í G.F.S. Sangbók. Tað kom eisini fyri, at vit vóru saman um veturin og hildu vakt í húsinum.

Hannis vitjaði onkuntíð norður til okkara, tá ið samfelagsmøti var í Betesda, og eg vitjaði suðureftir, tá møti vóru har suðuri. Annars tosaðu vit saman í telefon. Hannis var óførur at ringja og ofta kom prátið at verða um Zarepta. Hann hevði eitt stórt hjartalag fyri Zarepta. Seinast, vit tosaðu saman, var tveir dagar áðrenn hann fór frá hesari fólk. Tá var hann veikur á málinum, men skilagóður sum altíð.

Eg fari at enda hesi minningarorð við sanginum, sum Hannisi dámdi so væl og vit mangan sungu:

*Tá ið endar mítt stríð*
*og útrunnin mín tíð,*
*skal eg náa ta himmalsku strond,*
*Jesus eyga mítt sær*
*og tá vísir Hann mær*
*naglamerkini í síni hond.*

Niðurlag:
*Eg skal ganga til lívsvatnsins strendur*
*hoyra pálmanna friðsæla sús*
*eingin synd eingin sorg*
*er í himmalsins borg*
*men bert songur sum havsbylgjubrús.*

*Ferðin endar ei her*
*men til Himmals tað ber*
*til tað heimland, sum Jesus mær vann,*
*vinir hitti eg har*
*sum her skiltust frá mær,*
*gævi skjótt at tann stundin upprann.*

*Á ver tolin og bið*
*tí Guds himmalska frið*
*skal hin trúfasti fáa í løn*
*Tann ið krossin her ber*
*lívsins krúnu har fær*
*á Guds barn ver tí vakið í bøn.*

Ein heilsan til tykkum, sum stóðu Hannisi nær, Dávur og Jóna við familjum. Vit vita at tað er ein saknur, tá ein av okkara kæru verður tikin burtur. Vit syrgja ikki sum hini, sum onga vón eiga, 1. Tessalonikabræv 4. kapitul og 13. ørindi.

**Richard og Apolonia**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara høgt elskaði maður, pápi, verfaðir og abbi

**Regin Olsen**
**Tórshavn**

andaðist hósdagin 30. desember
á Landssjúkrahúsinum, 68 ára gamal.

Kistan fer úr Landssjúkrahúsinum
mánadagin kl. 17.00.
Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju
týsdagin kl. 13.00.

***Vegna tey avvarðandi***
**Hella**
**Niels Juel, Liljan og Randi**

Tey, ið ynskja at minnast Regin við blómum ella kransum, kunnu lata eina peningagávu til Meinigheitshúsið í Tórshavn, konta í peningastovnunum.

# Dánjal í Búðini farin



Jólamorgun andaðist Dánjal Pauli Danielsen, Dánjal í Búðini, Velbastaður. Hann náddi høgan aldur, stutt áðrenn hann doyði fylti hann 91 ár.

Líka frá ungdóminum av vísti Dánjal sín stóra áhuga fyri føroyska samfelagnum og tók lut í samfelagstjakinum í heilt breiðum týdningi. Hann vaks upp á Velbastað og byrjaði tíðliga at arbeiða á garðinum, sum hann seinri festi. Her hevði hann sítt lívsgrundarlag, og herfrá kom hann at arbeiða og luttaka í mongum viðurskiftum bæði innan jarðabrúk, politikk og øðrum samfelagsøkjum. Í sínum yngru árum hevði hann rættiliga tætt samskifti við Jóannes bónda, og sjálvbjargnishugsjónin, sum teir høvdu í felag, fylgdi honum alt lívið.

Samfelagsliga átók hann sær fleiri postar. Hann var nevndarlimur í Jarðaráðnum í mong ár, herav fleiri ár sum formaður. Eisini var hann umboðsráðslimur hjá SEV í eini 12 ár. Herav nøkur ár sum formaður. Hansara stóri áhugi fyri norðurlendskum samarbeiði hevði eisini við sær, at hann í fleiri ár var nevndarlimur í Norðurlanda Húsinum í Føroyum.

Persónliga kom eg at kenna Dánjal Paula gjøgnum politiska arbeiði. Hann gjørdist tíðliga partur av Fólkaflokkinum. Hann var framburðshugaður og sjálvstýrishugaður, tað var tí heilt nátúrligt fyri hann at halda seg til hendan flokk. Við sínum áhuga og arbeiðsvilja var hann ikki bara hvílandi limur, nei hann gjørdi mun, har hann var. Tí kom hann at vera í fremstu røð innan flokkin. Tá flokkurin í fimti árunum fekk ávísa afturgongd, tók hann saman við øðrum góðum monnum sum Hákun Djurhuus, Knút Wang, Poul Petersen, Martin Holm við fleiri, stig til at organisera tað flokkspolitiska arbeiði betur við valfeløgum og landsfelag. Fólkaflokkurin var fyrsti flokkur, sum organiseraði seg á hendan hátt. Dánjal gjørdist fyrsti landsformaður flokksins, og hevði hann hetta starv í eini 20 ár. Í 1970, tá eg kom á ting, var hann framvegis landsformaður og sigast má, at tað var ein fragd at kunna arbeiða saman við honum.

Í 1975 hendi eitt politiskt siðaskifti í Føroyum. Tað, sum var hildið at vera politiskt ómøguligt, nevniliga eitt samarbeiði millum Fólkaflokkin og Javnaðarflokkin, gjørdist veruleiki. Einum slíkum samarbeiði hevði Dánjal Pauli leingi verið talsmaður fyri, og tá samgongan millum hesar báðar flokkar og Tjóðveldisflokkin varð skipað gjørdist hann saman við Demmus Hentze umboð Fólkaflokksins í hesum landsstýri. Hann var landsstýrismaður í 6 ár og umsat hann m.a. vega- og havnamál, landbúnaðarmál og mentamál. Eisini umsat hann norðurlanda samarbeiði.

Dánjal Pauli var sera gløggur maður, eisini hevði hann stóra vitan og víðskygni. Hann var góður í ráðum og royndi altíð at fremja tær bestu og skilabestu loysnirnar. Hann var ikki harðmæltur, tá hann førdi fram síni sjónarmið, heldur var hann siðiligur og róligur. Tí var altíð lurtað eftir honum. Eg kann ikki minnast, at hann nakratíð kom við persónligum álopum, heldur ikki tá hann sjálvur var álopin. Hann var væl lýddur í politiska umhvørvinum og samarbeiðsevni hevði hann góð. Hann var trúfastur móti sínum hugsjónum og eisini sínum flokki, sjálvt um politiska telvingin onkuntíð kundi fara øðrvísi fram enn hann helt vera tann rættasta.

Nú Dánjal legði árarnar inn hevði hann livað eitt langt og virkið lív. Hann var mettur av døgum. Við honum hevur ein av Føroya stóru synum lagt frá sær.

Vit lýsa frið yvir minnið um Dánjal Paula Danielsen í Búðini.

**Jógvan Sundstein**